# – Eg fekk nógv burturúr

**Ein av teimum mongu, sum luttóku í Sangskeiðinum hjá Heimamissiónini, var 17 ára gamla Birna Jacobsen úr Syðrugøtu. Hetta er fyrstu ferð, at hon luttekur, men sum hon sigur, so er tað avgjørt ikki síðstu ferð**

SANGSKEIÐIÐ
*Henny Olsen*

– Eg fór sum so einsamøll á sangskeiðið, men eg føldi meg sera væl kortini millum hini. Øll vóru líka fitt og positiv, og eg fekk eisini nógvar nýggjar vinir.

Soleiðis greiðir Birna Jacobsen frá. Hon hevur í farnu viku verið á sangskeiðnum hjá Heimamissiónini í Nesvík, og henni dámdi avbera væl. Hon sigur seg hava fingið nógv burturúr, bæði andaliga og tónleikaliga.

– Skeiðið var sera læruríkt. Vit lærdu sangirnar skjótt, tí vit fóru skjótt ígjøgnum teir.

Jon Lotterud, norski kórleiðarin, dugdi eisini sera væl at læra frá sær.

– Samstundis, sum eg fekk nógv við tónleikaliga, so var skeiðið eisini gott andaliga.

### Við upp á alt

Birna hevur bert positiv ting at bera fram um norska kórleiðaran Jon Lotterud. Henni dámdi hann ómetaliga væl.

– Jon var sera stuttligur, og hann var altíð við uppá alt. Hann fekk alla tíðina lív í, og kundu standa leingi og fortelja krønikur. Honum dámdi eisini so væl í Føroyum, og helt, at føroyingar vóru av besta fólkaslagið. Tó var hann eitt sindur bangin um tað føroyska málið. Eitt, sum Birna legði til merkis, var, hvussu væl fyriskipað, sangskeiðið var.

– Tú komst har, og síðani fylgdi tú eini skrá alla tíðina. Eingi ivamál vóru, og tú hevði alla tíðina okkurt at gera.

Birna Jacobsen dámdi sangskeiðið sum heild sera væl. Konsertin í Fríðrikskirkjuni gekk avbera væl, bæði hjá henni og øllum kórinum. Spurd, um hon ætlar sær aftur næstu ferð, ivast hon ikki.

– Tað er heilt sikkurt. Eg havi fingið avbera nógv burturúr hesa ferð, og eg kann næstan ikki bíða til næstu ferð. Øllum teimum, sum ikki hava verið á sangskeiðinum, vil eg heita inniliga á, um at fara næstu ferð. Eg havi ikki angrað tað, og tað fara tit heldur ikki.



*Fríðrikskirkjan var fullsett, og fólk vóru biðin um at seta seg tættari enn vanligt, tá konsertin byrjaði. Nøkur vóru tó so óheppin at standa alla konsertina, men kanska gjørdi hetta ikki mun. Lagið var gott undan konsertini, og tað gjørdist ikki verri, tá konsertin var liðug*



# Konsertbrak í fullsettari kirkju

**Í farnu viku var árliga sangskeiðið hjá Heimamissiónini hildið í Leguhúsinum í Nesvík. Um 200 sangarar, børn og vaksin, vóru eina heila viku stødd í Leguhúsinum, har tey vandu ymsar sangir, sum síðani skuldu syngjast til eina stóra konsert í Fríðrikskirkjuni fyri almenninginum**

SANGSKEIDID
*Henny Olsen*
*Myndir: Maria Olsen*

Heimamissiónin, sum í farnu viku skipaði fyri árliga sangskeiðinum á leguhúsinum í Nesvík, hevði syrgt fyri góðum endabresti í Fríðrikskirkjuni á Toftum.

Konsertin, ið vardi knappar tveir tímar, var øll, sum hon varð, sera góð og gjøgnumhugsað. Heimamissiónin hevði í ár fingið fatur á norska Ole Lotterud at stjórna kórinum, og ikki kann sigast annað enn, at hann kom væl frá uppgávuni.

Fríðrikskirkjan var fullsett, og fólk vóru biðin um at seta seg tættari enn vanligt, tá konsertin byrjaði. Nøkur vóru tó so óheppin at standa alla konsertina, men kanska gjørdi hetta ikki mun. Lagið var gott undan konsertini, og tað gjørdist ikki verri, tá konsertin var liðug.

### Børnini løgdu fyri

Fyrst á skránni var barnakórið, sum eisini hevði verið á sangskeiðinum. Tummas Pauli Mýri og Hans Michael í Mittúni høvdu í ár fingið uppgávuna at leiða barnakórið. Tey sungu tríggjar vakrar sangir, og ein saman við teimum vaksnu. Til allar sangirnar vóru solo-sangarar, og hetta vísir bara, at vit eiga her heima á klettunum nakrar ungar og dugnaligar sangarar og tónleikarar, sum vit við árunum kanska fara at hoyra meir til. Barnakórið taldi íalt um 70 børn.

Seinni kom so størra kórið út at framføra. Tey høvdu vant ikki minni enn 14 sangir til konsertina. Nakrir av hesum sangum vóru heldur serligari enn hinir. Talan er um teir fimm: Mannamúgvan stúgvað er, He heals the brokenhearted, Síðsta ferð um fjørð, Sigurin og Syng Gudi lov. Hesir hava fyrr verið á skránni, tá sangskeið hava verið hildin. Nú høvdu tey so tikið hesar fimm og viðgjørt teir sum evni. Tey hava havt fimm bíbliutímar um hesar sangir, so tey rættiliga kundu skilja teir og veruliga vita, hvat tað var, tey sungu um. Hesir sangir vóru settir mitt í skránna, kanska so kórið fekk hita eitt sindur upp til høvið.

Til næstan hvønn sang vóru solo- sangarar, sum veruliga dugdu sítt. Ole Lotterud, kórleiðarin, dugdi eisini at fáa rættiligt lív í. Hann stóð frammanfyri kórinum og livdi seg inní sangirnar, líka sum alt kórið. Hann gekk síðani út millum áhoyrararnar, og vildi hava tey at syngja við til tann eina sangin. Hann fekk til endans áhoyrararnar at stilla seg upp og syngja við av hjartans gleði. Hetta fekk veruliga lív í áhoyrararnar, sum kortini vóru við uppá alt frá byrjan av, og tað merktist væl, at kirkjan var á tremur av væl fornøjaðum gestum.

### Jubileum

Heimamissiónin hevði gjørt nógv burturúr sangskeiðinum hesa ferð, væl merkt av tí, at hetta var 25unda ferðin. Luttakaratalið var á leið tað saman sum í fjør, og hetta er bert at fegnast yvir. Kórið, sum taldi um 140 sangarar, dugdi sera væl at framføra, og man leggur til merkis, at hetta er okkurt, sum kemur úr hjartanum. At man tá hevur ein fantastiskan kórleiðara, ger tað absolutt ikki verri, tvørturímóti.

Lagt er upp til eina líka góða konsert næstu ferð tað verður. Nakrir av sangarunum eru til sangskeiðið hvørt ár, og tískil verður kórið royndari fyri hvørja ferð. At ungfólk koma uppí er eitt pluss. Hesi duga at læra av teimum meira eldru og royndu sangarunum, og samstundis, at man hevur góðan kórleiðara, sum hevur holla kenning til kórvenjing og sang, og kanska dugir væl at læra frá sær.

Tað 25unda sangskeiðið hjá Heimamissiónini er nú farið aftur um bak. Eftir er bert hjá sangarunum at gleða seg til næstu ferð, og somuleiðis hjá øllum vælnøgdu áhoyrarunum.